# The President of the United States of America. Barack Hussein Obama

JOEN ERIKSEN

Hvem er han? Hvad er han? Hvor kommer han fra?

Tanker til eftertanke.

I Danmark var der nyligt en udsendelse som satte fokus på spørgsmålet om hvad man skal kalde Obama. Debatten gik på spørgsmålet, om man skal kalde ham sort, farvet eller neger. Og man snakkede om at man ikke før har haft dette sprog problem oppe at vende. Og man nu er blevet tvunget til at sætte ord på sagen.

De kom til konklusionen at man helst måtte bruge Obamas egne vendinger, som han bruger om sig selv og sine. Han kalder sig selv for sort. Og han er stolt af at være sort. Alt godt om det.

Men måden hvorpå man omtaler sorte på er trods alt ældgammel. Dette er intet nyt fænomen. For ca. 2000 år siden i Israel havde man allerede den gang på en pæn måde sat ord på dette sprogbrug. Israelitterne var alle lysere i huden, men iblandt dem fandtes der én igenkendelig person som ikke var lige så lys som dem. Han var så igenkendelig mørk i huden, at man gav ham tilnavnet Iskariot. Ordet Iskariot betyder "Manden fra sydlandet". Dette var ikke ment som et negativt udtryk, men i stedet for at kalde ham for en sort eller en neger, så kunne de på en pæn måde sige "manden fra sydlandet" altså ordet Iskariot og at de dermed mener med ham den sorte mand. Da vidste folk straks hvem i samfundet man snakkede om. Der var jo ikke SÅ mange sorte i deres land. Dengang var det ikke normalt at blande folkeslagene sammen, som i dag. Jern og ler side om side. De vidste straks hvem man snakkede om hvis man sagde: "Iskariot", manden fra sydlandet. Dette ord brugte de altså i stedet for at s!

ige negeren. Således kunne de på deres sprog give ham tilnavnet Iskariot. Navnet som i dag er kendt for at være fortabelsens søns navn.

Judas Iskariot, fortabelsens søn var ikke jøde. Han var hedning. Fra sydlandet, Ægypten.

I dag står vi så med en verdensleder som vi må konkludere at være fra sydlandet, altså fra Afrika.

Når vi nu i dag for første gang i mands minde har fået en afrikaner som verdensleder, så kunne det vel være sprogligt brugt, at sige at denne præsident er "Præsidenten fra sydlandet." eller Iskariot præsidenten.

Profetierne siger at det udvalgte folk vil anerkende en hedning, altså tage imod Antikrist som sin frelser. Dyret som bibelen forudsiger, skal opstå fra havet skal ikke opstige fra Atlanterhavet, men fra menneskehavet. Og verdens største og mest magtfulde menneskehav USA har endnu engang ladet et menneske opstå fra dette menneskehav.

Hele verden hylder ham som løsningen på verdens økonomiske, politiske og religiøse problemer.

Hvad er denne mand? Han skulle vel ikke være antikrist?

Hvem er han? Han skulle vel ikke være fortabelsens søn. Manden som svigter Guds folk, således at forstå at han vil lade alle, både små og store, rige og fattige påtage sig et mærke, så ingen kan hverken købe eller sælge uden at have dette mærke?

Hvor kommer han fra? Vel ikke fra neden, fra sydlandet?

Til Obamas ros vil jeg dog sige at han tilsyneladende ikke går ind for mord og bomber som hans forgænger, "torn og tidsel" busken. Ja det er jo derfra ordet stammer. Kain dræbte Abel. Og derfor blev Kain og hans afstamning kaldt for torn og tidsel folket. Den slags mennesker som jorden bærer i overmål af i dag.

Tornebush plagen er tilsyneladende hermed nået til vejs ende.

Hvilken plage vil denne president mon pålægge verden? Er det nu at pengenes registrering, vil finde sted? Mange terror problemer ville jo være blevet løst hvis man kunne følge og kontrollere enhver penge transaktion. Dette kunne let gå hen og blive en helt ny verdensorden. Vor tids helt nye måde at løse verdens konflikter på?

Er tiden kommet til registreringen af de tredive sølvpenge?

Til trængsel for dem som ikke vil underkaste sig dette nye verdenssystem. Dyrets mærke…

Livst so spyrst...

Lad os håbe at Obama ikke forvandles til en Osama. At Hussein ikke får tilnavnet Saddam. Men at Barack forbliver en lille menneskelig Barack i sig selv.

# Til landsins leiðslu: Gevið setrinum neyðugu játtanina

MFS

(Meginfelag føroyskra studenta)

Góðu landsstýri, løgting – samgonga, andstøða. MFS vil við hesum inniliga heita á tykkum um ikki at skerja figgingina til Fróðskaparsetur Føroya. Skerjingarnar fara at hava katastrofalar avleiðingar fyri virksemið á setrinum og eru als ikki í trá við samgonguskjalið, sum sigur seg vilja raðfesta útbúgving og gransking. Vit kunnu ikki góðtaka, at núverandi játtan verður mett at vera nøktandi fyri raksturin á setrinum. Veruleikin verður, at virksemi á Fróðskaparsetur Føroya verður skert munandi. Uttan mun til um skerjingarnar fara at raka allar útbúgvingarnar á setrinum, ella at ein deild verður avtikin, so verða avleiðingarnar katastrofalar. Skerjingarupphæddin er so stór, at hóast t.d. øll Søgu-og samfelagsdeildin verður niðurløgd, munar tað ikki nóg mikið. Gerst hetta veruleiki, verður eingin upptøka til stjórnmálafrøði og søgu komandi heyst og hugsast kann, at lesandi á deildini mugu fara uttanlands at gera sína útbúgving liðna.

Vit mótmala av tí allar harðasta, at politikararnir eitt nú velja at:

Lata søgu og samfelagsdeildina reka fyri vág og vind.

Leggja niður í øllum førum 9 størv, sum setrið við bit og slit hevur fingið sett. Millum hesar uppsagnir koma óivað at verða nógv høgt kvalifiserað og eisini útlendsk vísindafólk, sum hava verið ígjøgnum eina tunga metingartilgongd. Skulu tey sigast upp, er tað skaðiligt fyri alt umdømi okkara.

Niðurleggja útbúgvingina Master í lóg ella avtaka útbúgvingarnar í samfelagsfrøði, sum eru tær best umtóktu á setrinum, tá tað ræður um umsøkjarar.

Góðu politikarar; við hesari skerjing hava tit valt, at føroyski ungdómurin ikki skal hava góðar møguleikar at taka ein útbúgving í Føroyum. Tit velja at senda ungdómin av landinum. Tit velja at niðurprioritera vitan og gransking. Tit velja at vísa, at Føroyar eru eitt samfelag við óstøðugari politiskari leiðslu, tí hetta var ikki tað, sum var lovað setrinum fyri hálvum ári síðan. Tit velja ikki at raðfesta føroyska lógargransking og lógarmenning.

# Lívsvísdómur er ókeypis, tó krevur tilgongdin tíð og orku

TÓRA VIÐ KELDU



Tey, sum liva vaksna lívið gera væl, tá tey hava virðing fyri samanhaldi, vitan og gransking. Um hetta er ein náttúrligur partur í vaksna lívinum, gerst hetta eisini tað hjá teimum, sum koma eftir. Barndómur og ungdómur duga sjálvi at lesa og at søkja sær vísdóm og lærdóm - hetta tó best við vegleiðing.

**Lívið um vitanina**

Vitan er so mangt. Vit eru øll ymisk, og hava tí øll sera ymiska tilgongd og krøv til vitan. Onki er sum so absolutt, tó eru tað óivað fleirtáttaða vitanin, sum er løtt at bera. Mál, mentan, lívsspæl og fakligheit. Vitanin, sum er grund fyri einum lívi við innihaldi, og sum gevur okkum allar teir óteljandi møguleikar dagsins menniskja hevur.

Vitan hevur sítt egna lív, sum øll ella kanska heldur eingin eigur. Hetta lív má menniskjað sjálvt leita til og ogna sær. Her síggja vit best, at menniskjað lærir av tí tað ger. Hetta krevur tó eitt umhvørvi, har onkur vísir veg.

Her hevur sosiala netið stóran týdning fyri vitanarmenning hjá børnum og ungum. Okkum nýtast ikki at tøma mappuna ella vinna í lottospæli, um vitanin skal gerast okkara. Umhvørvið hjá børnum og ungum eigur miðvíst at stimbra hesa tilgongd. Ikki bara dagrøktarar, námsfrøðingar, lærarar ella tey, sum dagliga eru um tey, men eisini heim teirra.

**Lívið við borðið**

Heima er eitt borð, so at kalla "hjarta" í heiminum. Hetta borð er ein miðdepil fyri alla familjuna. Borðið stendur har familjan vanliga savnast. Við borðið fara fleiri av dagsins máltíðum niður um, her kunnu liggja brettspøl, ein seðil sum gevur boð um, hvar mamma ella pápi eru, eitt hugnaligt stað við onkrum leskiligum afturvið og fleiri onnur góð tiltøk. Líka sum eitt stað, har øll - uttan mun til, hvussu mong eru ella hvussu familjan annars er samansett - savnast til sosiala samveru og samskifti.

Kanska nakað romantiskt, og kanska halda vit, hoyrir ikki rættiliga tíðini til. Tó veit eg, at nakað er um tað. Óivað kenna fleiri hesa myndina aftur úr egnari søgu. Hvussu sær sama myndin so út í dag?

Vit kunnu væl spyrja, og víst eru mangir møguleikar, tó er vitleyst at undirmeta týdningin av at savna familju, vinir og kenningar um borðið at tosa um tað, sum rørir seg í gerandisdegnum, og tað, sum hevur týdning fyri hvønn annan. Hetta mennir sosiala samveru, sum er uppbyggjandi og positiv fyri børn og ung. Ongin stýring og noyðsla, einans ein góður møguleikar at fáa børn og ung á fund við borðið - at menna mentanartilvitið og almennu vitanina.

**Lívið broytt**

Uttan víðari ella djúpari gransking, havi eg tó hug at halda, at hetta hjarta í hvørjum heimi bankar heldur tamari enn í omanfyri lýsing av lívinum um borðið. Sjálvt um borðið stendur í sama stað, er tó lívið um borðið broytt.

Lívið hevur fingið ferð og fólk hava nógv at gera. Onkur er fluttur yvir á telduborðið, fleiri sita við eini lítlari hondteldu við spæli, onnur sita við sjónvarpið, fleiri eta heldur inni á stovukenda kamarinum ella kanska úti á matstovu. Onnur hava sett matin í eldfasta ílatið við komfýrin, so húsfólk kunnu fáa sær, tá ið tey hava tíð. Torført er jú at savna øll, sum hava hvør sítt ítriv, somu tíð.

**Lívið endurnýggjað**

Krevjandi gerandisdagurin eigur ikki at gerast eitt einaralív, har hvør passar seg og uttan hjálp og vegleiðing setur egna dagsskrá. Frælsið gevur eina einastandi ábyrgd av, at lívið ikki gerst ein eistaklinga uppgáva, men at vit taka okkum av hvør øðrum og hava áhuga.

Hetta er løtan at seta út í kortið kós fyri menning av børnum og ungum. Um samanhald, vitan og gransking ikki er náttúrligur partur í vaksna lívinum, gerst tað heldur ikki náttúrligt hjá teimum, sum koma eftir. Tí tá børnini og tey ungu skulu taka ábyrgd, er at størsta týdningi, at tey eru til uppgávuna búgvin.

Saman við dagrøktarum, námsfrøðingum, lærarum, eru tað tó foreldur og avvarandi, sum hava størstu ávirkan á børnini og tey ungu. Vegvísararnir, sum eggja eitt livandi lív og hjálpa unga ættarliðnum at seta kós. Lívsvísdómur er ókeypis, tó krevur tilgongdin bæði tíð til samveru og nógva orku.